**Landsstýrisins veðbrævaformáli A**

1) Gjaldingar eftir hesum veðbrævi skulu vera rindaðar postfrælst á bústaði kravánarans, sum tilskilaður er á síðu 1, ella á øðrum staði í landinum, sum kravánarin ger skuldaran kunnugan við.

2) Rættstundisligar eru allar gjaldingar ikki seinni enn sjeynda dagin eftir gjaldkomudag, við terminsgjaldingar fyrsta gjaldkomudag. Er gjaldkomudagurin ella síðsti stundisligi gjalddagur, halgidagur, leygardagur, ólavsøkudagur ella grundlógardagur, verður freistað til gerandisdagin eftir. Á sama hátt flytist lokadagurin við allar freistir eftir hesum veðbrævi. Tá ið gjaldingin, áðrenn nevnda freist er úti, er hjá Postverki Føroya til flytingar á gjaldstaðin, er hon rættstundislig.

3) Verður renta ella avdráttur ikki goldin rættstundis, hevur kravánarin, um ákrav er sett fram um hetta samsvarandi reglu 9 niðanfyri, heimild til at krevja 2% í ágávu av gjaldkomnu upphæddini og í minsta lagi kr. 100,00.

4) Skuldarin hevur skyldu at boða kravánaranum frá bústaðarskifti. Hesa fráboðan ber ikki til at skriva á gjaldingarblað, tá ið tað stendur á slíkum oyðublaði, at tað er ikki ætlað til tílíka fráboðan. Ákrav frá kravánaranum, so eisini uppsøgn, kann vera sent skuldaranum ella sett fram á seinasta kunnuga bústaði hansara, um enn bústaðarskifti hevur verið, uttan so at kravánarin kennir nýggja bústað skuldarans. Verður kravánarin varur við, at uppsøgnin av bústaðarskiftinum er ikki komin fram til skuldaran, skal hann siga skuldaranum frá uppsøgnini, um nýggi bústaður skuldarans er til skjals á fólkayvirlitinum ella fæst lagaliga á annan hátt.

5) Veðið fevnir um føstu ognina við tilhoyri eftir § 37 og § 38 í tinglýsingarlógini, inntøku av ognini, eitt nú leigu- og festigjald, endurgjalds- og tryggingarupphæddir.

6) Skuldarin bindur seg til, at hava veðið fullvæl brunatryggjað.

7) Kravánarin hevur veðrætt fyri kravi sínum eftir veðbrævinum um, at goldin verða høvuðsstólur, renta og javnlík gjøld, eitt nú fyrisitingargjøld, tryggingargjøld, dragurenta og ágávur eftir reglunum 3 og 8. Kravánarin hevur somuleiðis veðrætt fyri útreiðslu, sum hann av góðum grundum hevur havt av uppsøgn, innheintan, skuldyvirtøku, og tá ið hann skuldi røkja síni áhugamál, um onnur gjørdu rættarstig vend móti sama veði.

8) Høvuðsstólurin fellur ikki til gjaldingar við eigaraskifti, uttan so at annað er samtykt í veðbrævinum. Fráboðan skal kravánarin fáa um hvørt eigaraskifti, og rætt hevur hann at krevja nýggja eigaran at greiða skuldyvirtøkuna og at rinda kostnaðin av henni. Fær kravánarin ikki fráboðan um eigaraskifti, er honum - tá ið 3 vikur eru gingnar frá tí, at endaligt og ófreistað skeyti er lýst/lisið og útflýggjað frá tinglýsingarskrivstovuni - loyvt at krevja 2% í ágávu ella kr. 300,00 í mesta lagi av eftirstøðuni á veðbrævinum, um allur høvuðsstólurin verður standandi, tó at eigaraskifti hevur verið. Er samtykt í veðbrævinum, at høvuðsstólurin allur ella partur av honum fellur til gjaldingar við eigaraskifti, má verða goldið innan somu freist og tó ikki seinni enn 3 mánaðir eftir, at ognin endaliga er yvirtikin, sbr. regl. 9. f.

9) Tó at veðbrævið er ikki uppsigandi ella uppsagnarfreistin ikki úti, er kravánaranum kortini loyvt at krevja áogn sína innloysta, tá ið soleiðis er:

a) at renta ella avdráttur eru ikki goldin seinasta rætta gjalddag í seinasta lagi. Liggur tó tann treyt við, verður innloysing kravd, at skuldarin hevur ikki goldið rentu og avdrátt í seinasta lagi 7 dagar eftir, at skrivligt ákrav um hetta er framsett ella sent. Hetta ákrav kravánarans skal vera givið eftir síðsta rætta gjalddag og skal staðiliga vera tilskilað, at peningahæddin kann vera kravd innloyst, um renta og avdráttir ikki verða goldin, áðrenn freistin er úti sbr. í hesum sambandi regl. 2, seinasta pkt.

b) at bygningar, sum hava veruligan týdning fyri veðið, verða niðurtiknir, og fullgóð trygd er ikki komin ístaðin.

c) at veðið annars minkar munandi í virði ella verður vanrøkt, og fullgóð trygd verður ikki veitt, tó kravd.

d) at skuldarin noktar kravánaranum ella fulltrúa hansara atgongu til at skoða veðið.

e) at skuldarin ikki, tá ið tað verður kravt sannar, at veðið er fullvæl brunatryggjað, og

f) at ikki verður goldið rættstundis, tá ið eigaraskiftisgjald er avtalað, sbr. regl. 8.

10) Er ikki annað avtalað, verður veðbrævið verandi á ognini, um tvingsilsuppboðssøla berst á, sama um hon stendur av tí, at veðbrævið er mishildið, ella aðrar skyldur eru mishildnar, um so er, at eftirstøða og aðrar gjaldkomnar veitingar sambært uppboðssølutreytunum verða goldnar, áðrenn freistirnar í teimum treytunum eru úti. Ásetingarnar í veðbrævunum um mishald, so eisini tær í reglu 9, og ásetingarnar um, at veðskuldin fellur til gjaldingar øll ella partur av henni við eigaraskifti, eru ónýtar hjá kravánaranum, tá soleiðis er. Selur uppboðssølukeyparin ognina, áðrenn ár er liðið frá teirri endaligu uppboðssøluni, verður hetta ikki roknað fyri eigaraskifti.